

*Jákup Mikkelsen, politiski formaður Fólkafloksins á Tingi*
Mynd: Regin Dalsgaard

# Avmontera revolvara-politikkin

**Jákup Mikkelsen helt lítið um framferðina hjá Finansiel Stabilitet í málinum um Eik Banka. – Vit fara ikki at lata okkum alt lynda, segði hann á landsfundi Fólkafloksins.**

– Tað er ógvuliga arrogant av nevndarformanninum í Finansiel Stabilitet, tá hann skírir føroyingar sum fólk, ið loypur av 72. hædd og tá hann fer framvið 30. hædd sigur, at enn gongur væl, segði Jákup Mikkelsen á landsfundi Fólkafloksins, sum var í Virkinum á Sandi í gjár.

Hann legði upp til, at landsstýrið tekur upp samráðingar við donsku stjórnina um at finna eina loysn á málinum um tað vísir seg, at privatu áhugamálini ikki røkka at yvirtaka Eik Banka.

– Vit fara undir ongum umstøðum at loyva Finansiel Stabilitet at avvikla Eik Banka, sló Jákup Mikkelsen fast.

Hann segði eisini, at hann fann seg ikki í, at Finansiel Stabilitet hótti við einari dead-line sum segði 6. desember.

– Tað er niðurgerandi, at danir koma til Føroya við tí boðskapinum, og tað finna vit okkum ikki í. Vit mugu avmontera hendan revolvarapolitikkin, ongantíð ov skjótt, segði Jákup Mikkelsen, politiskur formaður á Tingi hjá Fólkaflokkinum á landsfundinum á Sandi leygardagin.

# ES OG NOR HÓTTA FØR

**Jacob Vestergaard segði á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum leygardagin, at ES og Noreg hótta Føroyar við, at líða vit ikki harraboð er ikki vist, at teir vilja samstarva á fiskivinnuøkinum**

Leo Poulsen

Sum vant er á landsfundi Fólkafloksins greiddu landsstýrisumboð floksins frá teirra málsøkjum. Jacob Vestergaard er fiskimálaráðharri og greiddi hann frá teimum økjum, hann umsitur í landsstýrinum.

Fyrst og fremst er tað fiskivinnan, men hann umsitur eisini landbúnaðin og tilbúgvingina.

Samráðingar eru í løtuni um ein nýggjan sáttmála sum skal tryggja, at tilbúgvingin verður fult dagførd við tveimum serútgjørdum trylum.

Nógv hevur verið tosað um tilbúgvingina seinastu tíðina, og atfinningar hava verið førdar fram móti einari ikki altíð nøktandi tilbúgving.

Hetta er eitt mál, sum liggur undir Fiskimálaráðnum, og Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, kom eisini inn á hetta evni undir framløgu síni á landsfundi Fólkafloksins í Virkinum á Sandi í dag.

– Tá sáttmálin um tilbúgving varð gjørdur fyri nøkrum árum síðani var støðan hon, at hesin sáttmálin tryggjaði eina heilt munandi betri tilbúgving, enn framman undan. Hinvegin hevur tøkniliga framgongdin seinastu árini verið so stór, at sáttmálin í dag ikki er nøktandi, segði Jacob Vestergaard.



*Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, á landsfundi Fólkafloksins í Virkinum á Sandi leygardagin*
Mynd: Regin Dalsgaard

Hann segði, at samráðingar í løtuni eru í gongd um at gera nýggjan sáttmála um tilbúgving, sum verður munandi betri og munandi meiri nøktandi, enn verandi sáttmáli.

Samráðingarnar ganga út frá, at vit hava tvær serútgjørdar tyrlur knýttar at tilbúgvingini, so vit ongantíð standa í einari støðu, at onnur tyrlan er til umvælingar, og hin hevur ikki neyðugu útgerðina, segði Jacob Vestergaard.

Hann vísti eisini á, at Noregi og Ísland eru í einari tilgongd at skipa eina felags tilbúgving við serútgjørdum tyrlum, sum kunnu nøkta tann tørv, ið kann uppstanda í økinum hjá hesum báðum londunum.

– Enn er ikki støða tikin til, um vit hava møguleika ella høvi at koma upp í hetta samstarvið, segði Jacob Vestergaard.

### Halda fast

Makrelurin hevur verið nógv á breddanum seinastu tíðina, og Jacob Vestergaard segði, at hann ætlar at halda fast um kravið at føroyingar skulu fáa størri part av makrelkvotuni.

– Tað eru tíggju ár síðani at semjan um makrelin var gjørd, ið gav føroyingum smá 5% av kvotuni. Vit hava sæð seinastu árini, og serliga síðani 2007, at makrelurin er nógv meiri í føroyskum sjógvi. Samstundis sóu vit, at íslendingar frá 2008 fóru at fiska nógv meiri makrel, og sama skilið var eisini í 2009, segði Jacob Vestergaard.

Hann vísti á, at føroyingar ongantíð hava verið nøgdir við býtið, men at vit ikki hava havt nakran søguliga fiskiskap í føroyskum sjógvi inntil nú. Tí hava vit grundað býtið á russiskan fiskiskap í føroyskum sjógvi.

– Tað hevur ikki eydnast at fingið eina avtalu í lag um makrelin, men vit hava rætt at krevja eitt størri býti til okkara, og tað er tí bara spell, at semja ikki er fingin við ES



*Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, segði, at røkka teir privatu ikki at keypa Eik Banka, so er støðan ein onnur*
Mynd: Regin Dalsgaard

# Latið ikki Eik fara fyri skeytið

**Osmund Justinussen tók orðið á landsfundi Fólkafloksins í Virkinum á Sandi í gjár, og hann ávaraði ímóti at sita hendur í favn og lata Eik Banka verða avviklaðan.**

Ein av trúgvu luttakarunum gjøgnum nógv ár á landsfundum Fólkafloksins er Osmund Justinussen, og hann var eisini við á Sandi í gjár.

Hann tók orðið á fundinum og fíltist at støðuna hjá Fólkaflokkinum um ikki at lata við seg koma í málinum um Eik Banka.

- Eik Banki hevur so stóran týdning fyri føroyskt vinnulív, og er inni í so nógvum verkætlanum, at tað verður ein vanlukka, um bankin verður avviklaður, segði Osmund Justinussen.

Hann heitti tí á floksleiðsluna um at føra ein meiri aktivan leiklut í málinum um Eik Banka og virka við til, at bankin heldur fram, sjálvt um tað so partvís skuldi verið við almennum pengum.

Jørgen Niclasen segði í sínari formansfrágreiðing,